


Nr. 15 *17. juli 2022* 82. árg.

# Trý tíðartekin

Jesus nevnir nøkur tíðartekin fyri afturkomu sína. Her skulu vit taka trý av teimum.

Fyrsta tekinið er snarljósið. „Tí at eins og snarljósið skyggir í eystri og lýsir í vestri, soleiðis skal koma menniskjusonarins verða.“ (Matt. 24,27). Hvat eyðkennir snarljósið? Jú, tað kemur óvæntað og dáttliga. Tá ið tað lýsir, er ov seint at fara at gera seg til. Tí skulu vit fyrireika okkum nú.

Næsta tekinið er tjóvurin. Hvat eyðkennir tjóvin? Hann kemur sníkjandi. „Vakið tí; tí at tit vita ikki, á hvørjum degi harri tykkara kemur! Men tað skilja tit, at um húsbóndin hevði vitað, í hvørji økt um náttina tjóvurin kom, tá hevði hann vakt og ikki latið verið innbrot í hús síni. Av hesi orsøk skulu eisini tit vera búnir; tí at menniskjusonurin kemur í teirri stund, sum tykkum ikki varir.“ Matt. 24,42–44.

Triðja tekinið er brúðgómurin. Hvat eyðkennir hann? Reinleiki! „Men um midnátt kom róp í: „Sí, nú kemur brúðgómurin! Farið út at møta honum.“ Matt. 25,6.

Hjá Lukasi lesa vit eisini um Jesu afturkomu bæði í 17. og 21. kapitli. Tá ið Jesus hevur sagt tíðartekini, er líka sum kvirt nøkur sekund. So rópar hann út yvir mannamúgvuna: „Minnist til konu Lots!“ (Luk. 17,32) Tá ið Jesus ávarar inniliga ímóti hesum, so er tað tí, at mong standa í vanda fyri at fella júst her.

Hvat umboðar kona Lots? Tíðarandan. Vit eru gromm og slúkin og liva í yvirflóð. Keypi- og brúkaralyndið í samfelagi okkara er farið langt út um øll mørk. Jesus lærdi okkum at biðja: „Gev okkum í dag okkara **dagliga** breyð.“

At keypa lutir, sum tú ikki hevur brúk fyri, fyri pengar, tú ikki hevur, fyri at vekja virðing hjá fólki, tú ikki kennir – hvat fyri lív er tað?

Pengar ger teg ikki eydnusaman. Vit fáa hægri løn, eta betri og hava betri útbúgving enn nakrantíð áður. Kortini so veksur hjúnaskilnaðarprosentið, sjálvmorðini økjast, og tað eru nógv fleiri tunglynt fólk enn nakrantíð fyrr. Fyri 2000 árum síðani skrivaði Seneca: „Peningur í sjálvum sær hevur ikki enn gjørt nakran ríkan." Hví? Tí tú ert tann, tú ert – uttan mun til, hvat ið tú eigur og hevur.

Tað er stór synd at oyðsla so. Tá hugsa vit bara um okkum sjálv og ikki um sálirnar, sum fara vinglandi móti ævigari glatan. Vit skulu standa Gudi til svars fyri øllum, sum okkum er litið til. Latið okkum ofra, soleiðis at Guds orð verður breitt út.

Vit mugu leggja størri dent á ævinleikan. Tá ið vit fara hiðani, fara vit inn í ævinleikan. Í hesari hipp-hopp og materialistisku tíð fara nógv trúgvandi ikki á møti, tí fótbóltsdystur ella onkur framhaldssendirøð er í sjónvarpinum. Jesus bað okkum seta ævinleikan fram um alt og líta at hinum æviga og ósjónliga og samla grøði til ævigt lív. (2. Kor. 4,18 og Jóh. 4,36).

*Effie Campbell.*

# Arvurin

**Lat meg siga tær eina frásøgn, sum eg einaferð hoyrdi.**
Fyri rættiliga mongum árum síðani var tað ein handilsmaður, sum kallaðist John Multon. Hann var fríteinkjari, tað vil siga, hann trúði ikki upp á Gud. Hann vanvirdi Bíbliuna, sum er Guds orð.

Nú gekst tað hvørki verri ella betur, enn at pápi hansara doyði, og einasti arvurin, sonurin fekk eftir pápa sín, var ein stór Familjubíblia.

John var argur inn á pápan, sum hevði keypt nakað so ónyttugt sum eina Bíbliu. „Tað nyttar mær einki at selja hana," segði hann við konu sína, „eg fái bara ein dollara fyri hana." Hann hugsaði seg um eina løtu, so segði hann: „Tað einasta, eg kann gera fyri at fáa nyttu burtur úr henni, er at brúka bløðini í henni at balla uttan um vørur, sum fólk keypa frá mær."

„Hatta haldi eg ikki vera skilagott," svaraði konan. „Mong av teimum, sum koma her at keypa, ganga í kirkju og á møti, og tey kunnu gerast ill og ikki koma aftur at keypa."

„Tað beri eg ongan ótta fyri,“ svaraði maðurin. „Tey mugu keypa frá mær, tí her er eingin annar handil.“

Dagin eftir bar John ta stóru, tungu Familjubíbliuna út í handilin og skræddi permuna av henni, og hvørja ferð, fólk komu at keypa, skræddi hann eitt blað út úr Bíbliuni og ballaði tað um vøruna, og eingin segði nakað.

Ein dagin kom ein bóndi av bygd inn til John Multon at keypa. „Eg skal keypa muskat,“ segði hann. Tá ið hann sá, at Multon skræddi eina síðu úr Bíbliuni og ætlaði at pakka vøruna í hana, segði hann: „Á nei, mín góði maður, hatta mást tú ikki gera. Í Orðtøkunum 13,13 lesa vit: „Tann, sum vanvirðir orðið, týnir seg sjálvan, men tann, sum boðorðið óttast, fær løn.“

„Ja, men eg havi einki annað pappír,“ segði Multon.

„Tað bilar einki,“ svaraði bóndin, „gev mær bara muskatið upp í lumman.“

Tá ið bóndin var farin, bleiv Multon við at hugsa um tað, sum bóndin hevði sagt. Tað var skilligt, at hann var illa við. Tá ið hann hevði læst handilin um kvøldið, tók hann arkið úr Bíbliuni fram. Hann hevði rukkað tað og stungið tað í lumman, tá ið bóndin sýtti fyri at brúka tað sum handilspappír.

Hann streyk við hondini eftir síðuni og royndi at slætta hana. Tá fullu eygu hansara á eitt skriftstað: „Men halt tú fram móti endanum; tú skalt leggja teg at sova og fara upp og fáa tín lut, tá ið dagarnir eru uppi!“ Dán. 12,13. Hann las tað fleiri ferðir. „Hvat man hetta merkja?“ spurdi hann konu sína. Niðriundir stóð víst til fleiri skriftstøð. Men tey hevði hann øll skrætt burtur, uttan tað síðsta, sum vísti til Opinberingina. Tá ið tey høvdu lisið tað, segði konan: „Okkara lutur! Hann man ikki fara at verða góður. Vit hava vanvirt Guds orð og harvið Gud sjálvan.“

Men broyting kom í hjá hesum hjúnum kortini. Hvørt kvøld lósu tey í hesi skrøddu, permuleysu Bíbliuni, og tá ið tey høvdu lisið hana at enda, keypti Multon sær eina nýggja. Tey vendu við og gjørdust gudsóttandi fólk. Soleiðis varð arvurin, sum gamli pápin læt son sín fáa, av sonnum ógvuliga virðismikil. Tí við trúgv á Jesus, gjørdist hann nú Guds arvingur (Róm. 8,17). Og tað, hann skuldi arva, var einki minni enn sjálvan himmalin. (Ják. 2,5).

*Effie Campbell.*

# Lat friðin ráða

*„Latið frið Krists ráða í hjørtum tykkara.“ Kol. 3,15.*

Tað fyrsta, tú missir, tá ið tú stígur út úr Guds vilja, er frið tín. Um tú ikki hevur frið í tí, tú ætlar tær at gera, ger tað so ikki! „Við gleði skulu tit fara avstað og í friði verða fylgd á veg,“ stendur skrivað hjá Jesaja 55,12. Ofta verður friðurin tað einasta, Gud gevur tær, so at tú kanst vita, um tú ert á veg inn ella út úr Hansara vilja. Hvørja ferð, tú brýtur friðarregluna, fert tú at angra og uppdaga, at lættari er at róta seg inn í okkurt enn út úr tí.

Í Jóh. 14,27 sigur Jesus: „Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum; eg gevi tykkum ikki eins og heimurin gevur.“ Verðin bjóðar okkum eina kenslu av friði, sum bara riggar í viðgongd. Men tá ið tú brádliga stendur mitt í óvæntaðum trupulleikum, og tú kortini kanst vera róligur, er tað Guds frið, tú upplivir. Ein frið, sum ber av øllum viti. (Fil. 4,7).

Hvussu fært tú henda friðin? Tú fært hann, tá ið tú leggur allar trupulleikar tínar yvir á Jesus. Hoyr: „Kastið alla sorg tykkara á hann; tí at hann hevur umsorgan fyri tykkum. Verið ódruknir, vakið! Mótstøðumaður tykkara, djevulin, gongur um sum ein ýlandi leyva, leitandi eftir tí, sum hann kann gloypa. Standið honum ímót, treystir í trúnni, við tað at tit vita, at tær somu líðingar henda brøður tykkara um allan heimin. Men Gud alrar náðar, sum kallaði tykkum til sína ævigu dýrd í Kristi Jesusi, aftan á líðing eina stutta tíð, hann skal sjálvur gera tykkum fulldugandi, menna, styrkja, grundfesta tykkum.“ (1. Pæt. 5,7–10).

*„... et Ord til Dagen“* – *Effie Campbell* umsetti.

---

Tað er týdningarmikið, at vit viðurkenna jødarnar sum „brøður“ okkara. Sum menniskju ganga vit nú einaferð best á tveimum beinum, og soleiðis er tað eisini í tí andaliga. Jødarnir hoyra við í frelsissøguna. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




Nr. 16 *31. juli 2022* 82. árg.

# Bøn, ið er mikið ment

*„Jesus talaði eitt líknilsi til teirra um tað, at teir áttu altíð at biðja og ikki troyttast.“ Luk. 18,1.*

Tá ið vit lesa um tey menniskju, sum hava verið stór í sínum bønarlívi, fær tað okkum at ynskja, at vit kundu biðið bønir, sum vóru meira mentar. Tað er týdningarmikið, at vit verða vakt upp, so vit skilja, hvussu neyðugt tað er við hesum bønarslagnum. Tíðin hevur tað við sær, at øll tuska avstað, og tí eru tað mong, sum ikki geva sær stundir at biðja. Men um vit vilja, at verk Harrans skal hava framgongd, so mugu vit hvønn dag taka okkum tíð at biðja. „Latið í øllum lutum tráan tykkara koma fram fyri Gud í ákallan og bøn við tøkk.“ Fil. 4,6.

Menn hoyrdu John Knox biðja: „Gev mær Skotland, ella doyggi eg!“ George Whitefield bað: „Gev mær sálir, ella tak mína!“ Brainerd segði meir enn eina ferð um seg sjálvan: „Eg legði ikki lag í, hvussu eg livdi, ella hvørjar trupulleikar eg mátti fara ígjøgnum, so leingi sum eg bara kundi vinna sálir fyri Kristus.“ Tá ið tey, sum sótu við leguna hjá Davidi Stoner, tá ið hann lá at doyggja, hildu, at andin var farin út úr likaminum, settist hann upp undir seg og segði: „O Harri, frels syndarar! Frels teir í dusinatali! Frels teir í hundraðtali! Frels teir í túsundatali!“ Tann eldhugin, sum hevði ræði á honum í lívinum, var eisini sterkur í deyðanum.

Stríðast vit í bøn fyri glataðum sálum? Má Harrin hjálpa okkum at skilja lagnuna hjá teimum glataðu. Má dagliga bøn okkara vera: „Gud, gev okkum eina størri byrðu, fyri at menniskju verða frelst.“

„Megnað bøn av rættvísum manni er mikið ment.“ Ják. 5,16 b.

„Um tveir av tykkum eru samsintir á jørðini um at biðja um okkurt, hvør søk tað so man vera, tá skal tað verða teimum givið av faðir mínum, sum er í himlunum.“ Matt. 18,19.

*„Kirkeklokken“ 1/1969. – Effie Campbell* umsetti.

# Kraftin í Jesu blóði 1:2

*„Reinsa meg við ýsopi, so at eg verði reinur, tváa meg, so at eg verði hvítari enn fann!“ Sálmur 51,9.*

Ein kona vitnaði á Blákrosskaféini. Hon segði frá einari lýsing, sum hevði staðið í bløðunum í 1950-árunum. Hon kundi ongantíð gloyma hana, og lýsingin hevði havt sterka ávirkan á konuna, hóast hon als ikki var ætlað at vera andalig.

Lýsingin var frá reinsarínum Ruba. Á myndini sást ein maður, ið var á veg inn gjøgnum einar dyr. Á beininum, ið enn stóð uttanfyri, var buksubrókin rukkut og skitin. Men á tí beininum, sum var komið inn um dyrnar, var buksubrókin rein og sløtt. Niðri undir lýsingini stóð skrivað: „Ruba reinsar, væl reinsað.“ Jesus sigur: „Gangið inn um hitt tronga portrið; tí at vítt er portrið, og breiður er vegurin, ið førir til undirgangs, og mong eru tey, ið ganga inn um tað; tí at trongt er portrið, og mjáur er vegurin, ið førir til lívs, og fá eru tey, ið finna hann.“ Matt. 7,13–14.

Portrið, ið førir til lívs, er so smalt, at har sleppa vit akkurát inn ígjøgnum. Har nyttar onki at koma dragsandi við ymsum viðføri. Øllum slíkum noyðast vit at sleppa og seta frá okkum, áðrenn vit fáa trongt okkum inn gjøgnum portrið, sum er ein mynd uppá frelsuna. Viðførið ímyndar heimsins lystir og innantóma fjant. Fjøldin livir eitt syndugt lív, langt burtur frá Gudi. Øll teirra tráan er at njóta lívið. Tey jagstra støðugt eftir heimsins rúsandi lystum. Ein stuttleiki avloysir tann næsta, og loysanarorðið er: „Et, drekk og ver glað.“ Tey hugsa ikki um, at tað kemur ein dagur, tá ið tey skulu møta ævinleikanum og roknskapinum.

Konan greiddi víðari frá, at eitt kvøldið, tá ið hon kom heim úr dansi, var hon í ringum lag. Hon hugsaði: „Er hetta alt, sum lívið hevur at bjóða? Tað er jú fullkomiliga tómt.“ Aftur talaði lýsingin til hennara: „Tú ert sum hin svarti „Ruba-maðurin“, men tú kanst blíva sum hin hvíti.“

Uppi á kamari sínum fall hon á knæ og bjóðaði Jesus inn í hjarta sítt. „Men so mongum, sum tóku ímóti honum, teimum gav hann mátt til at verða Guðs børn, teimum, sum trúgva á navn hansara,“ Jóh.1,12 „Reinsa meg við ýsopi, so at eg verði reinur, tváa meg, so at eg verði hvítari enn fann!” lesa vit í Sálmi 51,9. Tá ið vit biðja Jesus fyrigeva okkum, tá verður sálin reinsað í hansara blóði, og hon gerst hvítari enn kavi. Tá ið sólin skínur á nýlagstan kava, sker hann í eyguni, so vit noyðast at blunda. Kortini sigur Skriftin okkum, at eitt er til, sum er uppaftur hvítari, nevniliga tann sálin sum hevur fingið syndir sínar fyrigivnar. Jesus hevur lært okkum, at vit skulu biðja: „Fyrigev okkum syndir okkara...“ Og tað er neyðugt, tí vit synda dagliga, so leingi vit eru á hesum foldum, og tí er tað gott at vita, at Jesu blóð er so sterkt, at vit verða tváað fullkomiliga rein.

*Effie Campbell.*

# Blóðið verjir eisini 2:2

Men blóðið megnar meir enn at reinsa okkum. Tað verjir eisini. Ísraels fólk fingu boð um at smyrja blóðið av einum lambi upp á báðar durastavirnar og tvørtræið í erva, tá ið tey búðu í Egyptalandi, tí so skuldi deyðans eingil leypa tey um. Tá fóru tey at sita trygg inni, meðan alt ónt var útistongt. (2. Mós.12,7 og 13). – Vit í nýggja sáttmálanum hava Jesu blóð til nýtslu. Ein onnur kona segði einaferð niðri á Blákrosskaféini í vitnisburði sínum frá soninum. Hann var í ungdómsárum og spældi harðan rocktónleik. Tað var ikki bara tað, at tað var larmur og skrambul av ringasta slagi, sum gjørdi mammuna so forkroysta; men tað var djevilskur tónleikur, og tað vita vit, at sumt av hasum tónleikinum er. Á einum plátuhúsa hjá AC/DC t.d. stendur solisturin ílatin djevlahorn og hala, meðan ein annar ber eina stjørnu um hálsin, ið verður nýtt til heksaseremoniir.

Mamman visti eisini, at sjálvt um drongurin ikki fangaði orðini í sanginum, so verða tey lagrað niðri í undirvitskuni. Kortini vildi hon ikki júka inn á sonin, tí so gerast tey uppaftur treiskari. Hon ætlaði at fara fram á ein heilt annan hátt. Tá ið drongurin var farin í skúla, fór hon inn í kamar hansara. „Í Jesu navni áleggi eg øllum illum at víkja her frá,“ proklameraði hon.

Síðani streyk hon við hondini eftir durastavinum og segði: „Eg dekki hetta við Jesu blóði.“ So fór hon yvir til songina, og við fremstafingri teknaði hon ein kross niður á koddan, har høvur hansara plagdi at liggja. „Harri, eg fjali son mín undir tínum blóði. Verj hann!“ bað hon. Hetta gjørdi hon hvønn einasta morgun.

Tá ið nakrar vikur vóru farnar, hendi broytingin. Hon sá, at sonurin ruddaði kamarið og beindi fyri øllum, sum hevði volt henni sorg. Tá lovaði og prísaði hon Harranum. Jú, sanniliga, Jesu blóð verjir. Bið hvønn morgun og hvørt kvøld Harran fjala teg, øll tíni og títt heim undir Jesu blóði, og bið hann halda øllum óndum burtur frá tykkum.

*Effie Campbell.*

# Grundin

Grundin á einum húsi er tað týdningarmesta at fáa gjørt ordiligt. Paulus hevur nakrar hugsanir í hesum sambandi. Hann sigur, at andaliga grundin **er** bygd. Hon er Jesus Kristus. Hon kann ikki gerast betri. Tað er hann, vit byggja lív okkara á.

Men spurningurin er so, hvørjum tilfari vit byggja við oman á hesa grundina, ella sagt við øðrum orðum, hvat ið vit brúka lív okkara til. Brúka vit lívið at tæna Gudi við og soleiðis byggja við góðum tilfari, ella satsa vit mest upp á okkum sjálv og tað, sum vit kunnu fáa burtur úr lívinum? Tá byggja vit við træi, hoyggi og hálmi. Tað verður ikki standandi í ævinleikanum.

Liva vit fyri Harran, so skulu vit ikki bara vera livandi steinar í einum andligum húsi (1. Pæt. 2,5), men fleiri steinar verða lagdir afturat, so Guds ríki verður eitt uppaftur størri hús.

Hetta kanst tú lesa meir um í 1. Kor. 3,10–17. Her verða tey seks ymisku byggitilfarini nevnd. Tey trý góðu, sum verða standandi: gull, silvur, dýrir steinar. Tey vánaligu, sum brenna upp: træ, hoyggj, hálmur.

*Lars-Jep Elleby, LMF-blaðið.*
*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74